# ítróttur

Nr. 44 • hósdagur • 4. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 17 | 14 | - | 3 | 45 | 16 | 29 | 20 |
| 2 TB | 17 | 13 | - | 4 | 44 | 15 | 29 | 18 |
| 3 Dráttur | 17 | 10 | - | 7 | 37 | 26 | 11 | 16 |
| 4 ÍF | 17 | 7 | - | 10 | 25 | 33 | -8 | 10 |
| 5 KÍF | 17 | 6 | - | 11 | 22 | 42 | -20 | 7 |
| 6 Fleyr | 17 | 1 | - | 16 | 9 | 50 | -41 | 1 |

# Hans Fróði hevur fingið loyvið

**Spæliloyvið hjá Hans Fróða Hansen varð í seinstu viku sent til íslendska Fram, sum sostatt endaliga hevur fingið pappír upp á verjuleikaran.**

LEIKARASKIFTI
*Jákup Mørk*

Tað hevur verið ein søga av teimum heldur drúgvu, nú Hans Fróði Hansen endaliga hevur fingið staðfest sítt loyvi at spæla við íslendska Fram.

Longu í heyst søgdu vit her í blaðnum, at Hans Fróði saman við Fróða Benjaminsen var ávegis til íslendska Fram, men at byrja við vórðu hesar søgur tó avsannaðar.

Seinni gjørdist talan til samráðingar millum B68 og Fram, men hóast leikararnir báðir fyri góðum mánaði síðani fóru til Íslands, so hevur gingið striltið við spæliloyvinum hjá Hans Fróða.

Sum skilst, so var orsøkin fyrst og fremst, at B68 vildi hava nøktandi trygd fyri pengunum, sum teir skulu hava.Og fyrr enn hetta varð gjørt, vildu teir ikki útflýggja nakað spæliloyvi.

Á heimasíðuni, www.b68.fo, verður nú staðfest, at spæliloyvið varð sent Fram í seinastu viku. Við heimasíðuna sigur Niclas Davidsen, formaður í B68, at talan var um formalitetir, sum teir vildu hava upp á pláss, men at hesir nú eru avkláraðir.

So eftir eina bíðitíð upp á nærum hálvt ár, er nú endaliga greitt, at Hans Fróði Hansen fer at spæla við Fram hetta kappingarárið.



*Hans Fróði Hansen kann nú loksins tørna út fyri íslendska Fram*

## Ein dystur

Ein flogbóltsdystur er á skránni hóskvøldið.

Hesin verður í Gundadalshøllini, har Fleyr tekur móti KÍF, og tó at dysturin ikki hevur nakran týdning fyri oddastríðið, so fara báðir partar helst at leggja nógv fyri.

Fleyr endar uttan iva kappingarárið á niðasta plássinum, men skulu tær pynta eitt sindur um, so er møguleikin fyri hesum helst í hesum dystinum. KÍF fekk at kalla øll síni stig longu fyrstu umførini av kappingini, og spurningurin er so, hvørt tær nú kunnu vísa, at hóast laku úrslitini, so eiga tær ikki at metast sum veikasta liðið í deildini.

Dysturin er settur at byrja kl. 20.00. **-jm**






# Danska finalan

**Um vikuskiftið tryggjaði liðið hjá Klaus Adamsen sær danska meistaraheitið í bridge**

BRIDGE
*Bogi Simsen*

Fyrst ein lítil stubbi um FM-kappingina fyri pør. Her skuldi hálvfinalurnar eftir ætlan verið leiktur seinasta leygardag, men eru hesar nú fluttar til komandi leygardag. Samstundis er tilmeldingarfreistin flutt til 5. mars.

**DK- Finalan:**

Klaus Adamsen – Peter Schaltz: 149,5-138

Fyri nógvar føroyskar Bridgespælarar er tað, at fylgja við í bestu donsku bridgedeildini tað sama, sum tað er hjá fótbótlsfjepparum, at fylgja við í enskum fótbólti. Hetta vikuskiftið varð so vinnarin av donsku kappingini funnin. Nógv vóru tey, ið hugdu eftir finaluni á alnetinum á www.swan.dk.

Finalan stóð millum liðini hjá Klaus Adamsen og Peter Schaltz. Tað gjørdist ein sera jøvn og spennandi finala. Liðið hjá Peter Schaltz stóð til at vinna finaluna, men tvey fylgjandi kostnaðarmikil spøl gjørdu, at liðið hjá Klaus Adamsen kortuni vann.

Hetta var annað av spølinum, ið vendu finaluna til fyrimunar Klaus Adamsen.

V/NS

| | | |
|---|---|---|
| | EKD | |
| | 8 | |
| | D1092 | |
| | B10732 | |
| B97 | | 10864 |
| EB10976 | | D32 |
| 8 | | K6 |
| D65 | | EK94 |
| | 532 | |
| | K54 | |
| | EB7543 | |
| | 8 | |

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Peter Fredin | Thorvald Aagaard | Mathias Bruun | Jan Nicolaisen |
| 2R | pas | 3H | pas |
| pas | D | pas | 4R |
| ap. | | | |

2R = Multi
3H = Pass or correct
11 stik 150

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Dennis Koch-P | Dorthe Schaltz | Klaus Adamsen | Peter Schaltz |
| 2H | D | 4H | D |
| ap. | | | |

Suður meldaði ikki tann vinnandi 5R, men valdi at straffa 4H, hetta skuldi koma til at kosta nógv. Efter SE og SD skifti Norðan til R10, ið REv tók via RK, og Sunnan spældi R5 aftur. Eftir hetta vinnur vestan meldið við at klípa eftir HK og skvisa norðan, ið skal halda báðum teimum svørtu litinum.



## Ársaðalfundur

Fornminnisfelagið í Nes kommunu heldur ársaðalfund í gamla prestagarðinum á Nesi 13/3-2004 kl. 15.30.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo






## Maskinførari

Søkt verður eftir maskinførara at byrja beinanvegin.

## Timburmaður

Søkt verður eftir timburmanni at byrja beinanvegin.

**Áhugað kunnu ringja til tlf. 449270, fart. 227255**

JKH ENTREPRENØRAR
✆ 44 92 70 - 22 72 55 - Fax 44 92 71
• JØRD & BETONG
• TIMBURARBEIÐI
• HÚS - HÚS - HÚS



**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

## Frítíðaravloysarar

Søkt verður eftir sjúkrasystrum, sjúkrahjálparum, heilsuassistentum og heilsuhjálparum umframt ymiskum hjálparfólki, ergo- og fysioterepeuti og húsavørði.

Skrivlig umsókn við neyðugum prógvum o.ø. verður at senda til heimið áðrenn 24. mars 2004.

## Hús í Árnafirði til sølu ella leigu



Um hóskandi boð fæst, eru sethús í Árnafirði á matr. nr. 54, til sølu ella leigu.

Húsini eru í tveimum hæddum á umleið 75 fermetrar.

Grundøkið umleið 522 fermetrar. Byggiár 1957.

Í stovuhæddini eru: Durur, køkur, tvær stovur og vaskirúm. Í ovaru hæddini eru: Fýra kømur og wc og bað.

Húsini eru vælhildin, nýtt tak, nýggj vindeygu og kløðd við plastik.

**Tlf. 455893 ella 281893**

## Starvslýsingar á www.portal.fo

**Kostnaður:** (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

**Kostnaður:** (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

2 lýsingar = -20% í avsláttri
3 ella fleiri = -30% í avsláttri

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

*Til kvinnur og menn*

## Kostskeið á Húsarhaldsskúla Føroya




**Skeiðið byrjar týsdagin 9. mars**

Undirvísarar:
Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu- og húsarhaldsfrøðingur
Elisabeth Akursmørk, økonoma

| Kl. | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 09.30 - 11.00 | - ● | - ★ ✓ | - ● |
| 13.30 - 15.00 | - ● | - ● | - ✓ |
| 17.00 - 18.30 | - ★ ✓ | - ✓ | |
| 18.45 - | ✓ | ✓ | |

- · Byrjarar (90 min.) 700 kr. fyri skeiðið - Gjaldast skal fyrsta dagin
- ★ Serliga ætlað teimum, ið viga 30 kg ov nógv
- ● Framhald (45 min.) 500 kr. } Til tey ið hava luttikið áður
- ✓ Bert vigast 300 kr.

Feittprosentið verður mált 3. hvørju viku

**HÚSARHALDSSKÚLI FØROYA**
Stoksoyrarvegur 29, 700 Klaksvík, Tel. 456974, T-postur:hsf@post.olivant.fo